# Vegleiðing til Mínrokning-portalin

MR-portalurin er partur av tí portali, sum veitarin vanliga fær rokningar inn á – frá t.d. ALS, AM-grunninum og Barsilsskipanini. Fleiri aðrir veitarar senda eisini rokningar inn á hendan portalin – til v-talið hjá veitaranum. Vanliga er einki samband millum hendan portalin og bókhaldsskipanina hjá veitaranum. Men tað kann tað vera. – Tað er tað hjá landinum (Búskaparskipan landsins), Tórshavnar Kommunu og nógvum størri virkjum. Hendan vegleiðing er gjørd við tí í huga at senda talgildar rokningar til landið, serliga Búskaparskipan landsins.

Í MR-portalinum kann veitari skráseta talgildar rokningar, sum – umvegis v-tal ella GLN-nr – verða sendar kunda hjá veitara.

Er talan um landið – kundar, sum brúka Búskaparskipan landsins – so merkir hetta, at veitarin lýkur lógarkravið um at senda talgildar rokningar.

At senda talgildar rokningar til Búskaparskipan landsins er ikki, at "so má kundin inn at heinta eitt skjal, sum bara fer í eina móttøkumynd". Men tað er, at allar neyðugar upplýsingar um ein veitara, ein kunda og eina rokning verða sendar beinleiðis inn í Búskaparskipan landsins – soleiðis at almenni kundin bara skal áseta, hvussu rokningin skal bókast, og góðkenna at hon verður goldin. Men allar upplýsingar um, "hvør sendir", "hvørja kontu skal rindast á" (íroknað FI-gjaldsstrong); "fyri hvat – herundir hvat er vøra, og hvat er MVG"; og hvør rokningadagfestingin er – alt hetta verður sjálvvirkandi skrásett í Búskaparskipan landsins. Landið endurnýtur alt tað, sum veitarin hevur sent talgilt. Veri seg frá egnari bókhaldsskipan ella frá hesum rokningaportali.

Innihaldsyvirlit


1 AT SKRÁSETA OG SENDA TALGILDAR ROKNINGAR 2

**1.1 Skrásetingarmynd til talgildar rokningar 2**

**1.2 Skrásetingar um rokning og um veitara 3**

1.2.1 Faktura 3

1.2.2 Avsendari 3

1.2.3 Móttakari (tín kundi) 3

**1.3 Skráseting av vørulinjum, gjaldsupplýsingum og viðheft skjøl 4**

**1.4 Váttan um, at Mínrokning sendir tínar upplýsingar til rætta stað 5**

# 1 At skráseta og senda talgildar rokningar

Ein veitari (brúkari av MR-portalinum) má hava ein brúkara – brúkaranavn og loyniorð – til MR-portalin. Hesar upplýsingar – og nullstilling av loyniorð vm – kunnu fáast frá Servicedesk hjá Elektron (sd@elektron.fo).

## 1.1 Skrásetingarmynd til talgildar rokningar




Tá ið ein veitari – tvs v-tal + navn og adressa – eru skrásett í brúkaraskránni hjá Mínrokning, so eru nakrar grundupplýsingar givnar, tá ið veitari velur at nýta MR-portalin at skráseta talgildar rokningar við.

Tú trýstir á næstovasta ikon á vinstru síðu á breddanum – "rokningar". Síðani trýstir tú á "Stovna rokning". Síðani skuldi myndi sæð út sum omanfyri. Tú sært, at her er tað "Brypo v-tal 502553", sum hevur loggað á og skal senda talgilda rokning.

Skrásetingarmyndin er sett saman av 4-5 pørtum:

- **Upplýsingar um rokningina** (fakturanr; hvør hevur umbiðið (stóran týdning); fakturadagur; intern konto (um t.d. almennur stovnur vísir til ávísa deild ella verkætlan); kundanummar og keypsordri/rekvistiónsnr
- **Upplýsingar um avsendara** (títt virki) og **um móttakara** (tín kunda): alt um títt virki er sjálvvirkandi fylt út. Um móttakaran, har kanst tú leita við antin v-tali kundans ella GLN-nr kundan, so fært tú navn, adressu v.m. fylt út fyri teg. Gjaldstovan hevur uttan iva fleiri ferð upplýst tær, hvat GLN-nr tú skalt brúka til ymsu kundar tínar.

- **Vøruupplýsingar:** vørunummar, vørutekstur, nøgd, eind, prísur (og møguliga avsláttur).
- **Gjaldsupplýsingar:** Gjaldsdagur; Gjaldsháttur (kontu til kontu e.a.); bankakonta
- **Annað:** Viðmerkingar og at hefta fílur við – t.d. ein faktura við útgreiningum.
- **“Send”:** og at enda verður trýst á “stovna” fyri at senda talgildu rokningina

## 1.2 Skrásetingar um rokning og um veitara

### 1.2.1 Faktura

“Faktura”: har má alt fyllast út handliga. Har ið “*” stendur, merkir, at teigurin – smb lóg um talgildar rokningar – skal vera fylt út.

### 1.2.2 Avsendari

Tað er fylt út, tá ið tú loggar á.

### 1.2.3 Móttakari (tín kundi)

Her eru tveir mátar at finna kunda tín fram – tøppa inn v-talið ella GLN-nr hjá kundanum.












## 1.3 Skráseting av vørulinjum, gjaldsupplýsingum og viðheft skjøl

At fylla út vørulinjurnar er “líka fram”. Skrásetingarmyndin roknar út – bæði upphæddir og avsláttur.




Tú kanst áseta gjaldsdag, og hvørja kontu flytast skal á – umframt at tú kanst velja FI-gjaldsstrong/Inngjaldskort í staðin fyri bankakontu.

Tá ið skrásett verður í Búskaparskipan landsins, at tú sendir talgildar rokningar frá t.d. tínum v-tali, verður henda upplýsing skrásett á ta bankakontu, sum tú plagar at fáa gjaldið á. Tað verður tí, sum útgangsstøði, eisini goldið á hesa kontu, hóast tú skrivar "okkurt annað". Tað er, at "v-tal er skrásett á vanligu útgjaldskontu hjá ávísum veitara", sum ger, at talgilda rokningin "finnur uppá pláss sjálvvirkandi í Búskaparskipan landsins" – og í tann mun er upplýsing um bankakontu bara ein tekstupplýsing.

Gjaldstovan skal hava boð um, at nú skulu útgjøld á nýggja kontu – og so verður tað rættað. Men fyrstu ferð talgild rokning verður send, er henda upplýsing avgerandi fyri, hvørja kontu talgildar rokningar til landið verða goldnar á eftirsíðan.

Tú kanst skráseta ymsar eyka "viðmerkingar", sum hava týdning fyri kunda tín. Og tú kanst viðhefta skjøl (í tiff-formati), sum hava fleiri upplýsingar, enn tú hevur skrásett í skrásetingarmyndini omanfyri.

## 1.4 Váttan um, at Mínrokning sendir tínar upplýsingar til rætta stað

Tá ið tú trýstir "Stovna", fært tú eini boð um, at Mínrokning hevur stovnað talgildu rokning tína, og at hon verður send kundanum – í hesum føri landinum/Búskaparskipan landsins – tí stovni, sum er kundi tín. Tá ið tú sendir til eitt ávíst GLN-nr – sum er knýtt at bókhaldaranum hjá tínum kunda – so verður rokningin ikki bara sjálvvirkandi skrásett í Búskaparskipan landsins, hon finnur eisini veg júst til bókhaldaran hjá tínum kunda.

